# Fimti sigurin upp í slag

**FLOGBÓLTUR** Kvinnurnar hjá TB hava verið sera sannførandi í landskappingini seinastu umførini. Sigurin á Drátti í gjár var tann fimti upp í slag

Uni Holm Johannesen

10 stig av 10 møguligum.

Tað er úrtøkan hjá TB seinastu vikurnar. Góða gongdin hevur við sær, at kvinnurnar av Tvøroyri hava togað seg munandi nærri triðja plássinum í deildini.

Hesaferð stóð Dráttur fyri skotum. Guðrið Nolsøe gekk fremst, tá TB vann 3-1.

TB hevði tamarhald á støðuni meira ella minni allatíðina. Gestirnir svaraðu aftur í triðja setti, men so tók Guðrið Nolsøe ábyrgd og tryggjaði TB bæði stigini.

### Ovastu liðini vunnu

Mjølnir og Fleyr, sum eru nærmastu kappingarneytarnir hjá oddaliðnum SÍ, vunnu sínar dystir um vikuskiftið.

Mjølnir vann lætt og einfalt á Ternuni. Botnproppurin vitjaði í Klaksvík fríggjakvøldið. Kvinnurnar úr Klaksvík vunnu 3-0 við settúrslitunum 25-12, 25-18 og 25-23.

Fleyr vann tætta dystin móti ÍF. Úrslitið var 3-2. Liðini togaðust um leiðsluna allatíðina, men havnarliðið hevði yvirvág í seinasta settinum. Úrslitið var 15-10 í fimta settinum.

Oddaliðið SÍ vann 3-0 á KÍF, og varðveitti stigamunin á tvey stig niður til nærmastu kappingarneytarnar.

uni@sosialurin.fo

**KVINNUR:**

**SÍ – KÍF** 3-0
(25-21, 25-13 og 25-12)

**TB – Dráttur** 3-1
(25-21, 25-16, 23-25 og 25-22)

**Fleyr – ÍF** 3-2
(25-20, 25-23, 18-25, 21-25 og 15-10)

**MENN:**

**TB – Mjølnir** 1-3
(14-25, 25-23, 18-25 og 19-25)

**Fleyr – ÍF** 3-2
(19-25, 25-22, 25-18, 09-25 og 15-13)

**Eik-ligan *menn***

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 11 | 9 | 2 | 29 | 9 | 20 | 18 |
| 2 | SÍ | 10 | 8 | 2 | 26 | 7 | 19 | 16 |
| 3 | Mjølnir | 10 | 5 | 5 | 17 | 17 | 0 | 10 |
| 4 | Fleyr | 10 | 4 | 6 | 14 | 22 | -8 | 8 |
| 5 | TB | 11 | 0 | 11 | 2 | 33 | -31 | 0 |

**Eik-ligan *kvinnur***

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 10 | 9 | 1 | 27 | 10 | 17 | 18 |
| 2 | Mjølnir | 10 | 8 | 2 | 27 | 8 | 19 | 16 |
| 3 | Fleyr | 10 | 8 | 2 | 26 | 13 | 13 | 16 |
| 4 | TB | 10 | 7 | 3 | 24 | 16 | 8 | 14 |
| 5 | ÍF | 10 | 4 | 6 | 17 | 20 | -3 | 8 |
| 6 | KÍF | 10 | 2 | 8 | 9 | 27 | -18 | 4 |
| 7 | Dráttur | 10 | 1 | 9 | 13 | 28 | -15 | 2 |
| 8 | Ternan | 10 | 1 | 9 | 7 | 28 | -21 | 2 |



*Tað var óvæntað, at Fleyr vann á oddaliðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fleyr koppaði oddaliðnum

**FLOGBÓLTUR** Tað var líkt til, at ÍF fór at snara dystargongdini, tá fuglfirðingar vunnu greitt og einfalt í fjórða settinum. Men heimaliðið bardi seg aftur og vann á oddaliðnum

Uni Holm Johannesen

Fleyr trein fyrimyndarliga inn í leiklutin at arga ovastu liðini í gjár. Liðið úr høvuðsstaðnum hevur ikki staðið oddaliðunum kurl í hesum kappingarárinum, men tað eydnaðist hinvegin í gjár.

Fleyr fekk tvey stig afturat í skjáttuna í gjár, tá oddaliðið ÍF vitjaði í Gundadalshøllini. Fuglfirðingar hava verið sannførandi í hesum kappingarárinum, men hesaferð eydnaðist minni væl.

Ein fyrimyndarligur stríðsvilji legði grundarlagið undir sigurin. Hóast Fleyr var í stórum mótburði, stríddust havnarmenninir væl.

ÍF vann fyrsta settið við 25-19, áðrenn heimaliðið fekk tamarhaldið. Havnarmenninir vunnu næstu tvey settini, men í fjórða settinum gekk fullkomiliga galið. ÍF vann heili 25-9, og gestirnir høvdu greiðan mentalan fyrimun undan seinasta settinum.

Tað varð hinvegin ikki avgerandi, tí Fleyr svaraði aftur og vann seinasta settið 15-13.

### Vunnið á teimum ovastu

Fleyr hevur nú átta stig. Sigurin í gjár var tann næsti móti einum av oddaliðunum. Tvær ferðir hava havnarmenninir vunnið á TB, sum er botnproppur á stigatalvuni.

Í fyrsta umfari vann Fleyr á SÍ í Sørvági. Og við sigrinum á ÍF í gjár hava havnarmenninir gjørt sítt til at røkja sín leiklut sum at arga ovastu liðini.

### Greiddu sína skyldu

Mjølnir greiddi sína skyldu á Tvøroyri í gjár. Menninir úr Klaksvík vunnu 3-1.

Settúrslitini vóru 14-25, 25-23, 18-25 og 19-25.

TB setir sær smá mál sum uppflytari. Fyrsta málið, sum var at vinna eitt sett, er rokkið, og hesaferð eydnaðist aftur at vinna eitt sett. Framvegis mangla fyrstu stigini.

Mjølnir hevur havt ov stór sveiggj í sínum avrikum higartil. Úrslitið er, at liðið er átta stig aftan fyri oddaliðið. Næstu vikurnar skal liðið spæla móti Fleyr á heimavølli, og SÍ á útivølli. Um klaksvíkingar fáa luft undir veingirnar og fáa skava nógv stig saman komandi tíðina, kunnu teir framvegis halda lív í dreyminum at bjóða av í stríðnum um føroyameistaraheitið.

uni@sosialurin.fo